# Grannskoðaraeftirlitið

---

# Ársfrágreiðing fyri eftirlitsárið 2024

Skráseting Føroya

Skráseting Føroya er avgreiðslustova hjá Grannskoðaraeftirlitinum

## Innihald

1. Inngangur ... 2
1.1. Fjareftirlit ... 2
2. Lóggáva ... 3
3. Grannskoðan í Føroyum ... 4
3.1. Grannskoðanarvirkir ... 4
3.2. Góðkendir grannskoðarar ... 5
4. Grannskoðaraeftirlitið ... 6
4.1. Lóggáva ... 6
4.2. Skipan av Grannskoðaraeftirlitinum ... 6
4.3. Fígging ... 7
5. Góðskueftirlit ... 8
5.1. Endamálið við góðskueftirliti ... 8
5.2. Góðskueftirlitsfólkini ... 8
5.3. Innihaldið av einum góðskueftirliti ... 8
5.4. Val av stakroyndum ... 9
5.5. Skyldurnar hjá grannskoðanarvirkinum ... 10
5.6. Frágreiðing um góðskueftirlit ... 10
5.7. Avgerð hjá Grannskoðaraeftirlitinum ... 10
5.8. Grannskoðaranevndin ... 11
5.9. Títtleikin av góðskueftirliti ... 11
5.10. Leiðreglur ... 12
6. Góðskueftirlit 2024 ... 13
6.1. Vanligu góðskueftirlitini ... 13
6.2. Virkisætlan ... 15
6.3. Uppfylgjandi góðskueftirlit ... 15
6.4. Grannskoðaranevndin ... 15

## 1. Inngangur

Grannskoðaraeftirlitið almannakunnger við hesum árligu frágreiðingina um virksemi sítt[1].

Í undanfarnu ársfrágreiðing fyri eftirlitsárini 2022-2023 var avgjørt, at ársfrágreiðingar frá Grannskoðaraeftirlitinum bert fevna um tey góðskueftirlit, ið vera avgreidd í eftirlitsárinum. Bíðað verður sostatt ikki eftir, at viðgerðin av góðskueftirlitum í eftirlitsárinum eru liðug og avgreidd.

Hendan ársfrágreiðingin, ið er tann tólvta í røðini, fevnir tískil um virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2024 til 31. desember 2024. Ársfrágreiðingin verður almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya: https://www.skraseting.fo/fo/-grannskodarar/grannskodaraeftirlitid.

Grannskoðaraeftirlitið hevði 6 fundir í 2024.

### 1.1. Fjareftirlit

Grannskoðaraeftirlitið hevur fyrr gjørt av at fremja góðskueftirlit sum fjareftirlit (t.v.s. yvir alnótina), hetta var í 2020. Grannskoðaraeftirlitið hevði tá ein eftirmetingarfund við Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG) um fjareftirlitið. Tað var tá metingin hjá FFG, at fjareftirlitið hevði riggað væl, men at eitt eftirlit á staðnum er lættari tá tað kemur til at samskifta. FFG dámdi sum heild betri eitt eftirlit á staðnum, men var ikki heilt avvísandi fyri einum fjareftirliti, um ávís viðurskifti vera betraði. FFG var eisini av tí fatan, at fjareftirlit hóska seg betur til eftirlit, ið eru minni í vavi, meðan fysisk eftirlit hóska seg betri til størri eftirlit, sum krevja drúgt samskifti.

Grannskoðaraeftirlitið hevur í samráð við FFG gjørt av, aftur at royna fjareftirlit. Hetta inniber, at Grannskoðaraeftirlitið framyvir fer at royna, í tann mun tað ber til, at skipa uppfylgjandi góðskueftirlit sum fjareftirlit. Hetta verður roynt við støði í teimum royndum og afturboðanum, ið komu í 2020. Uppfylgjandi eftirlit verða mett at hóska væl til fjareftirlit, av tí at hesi verða framd við støði í einari virkisætlan, og vanliga eru minni í vavi enn vanlig góðskueftirlit. Hetta verður eisini mett at vera til frama fyri tey grannskoðanarvirkir, ið skulu til uppfylgjandi góðskueftirlit, av tí at útreiðslur til flogferð og gisting verða burtur.

Við støði í framtíðar fjareftirliti, verður ein eftirmeting gjørd, og støða aftur tikin til, um hesin leistur skal halda fram.

---

[1] § 33, stk. 8, í grannskoðaralógini.

## 2. Lóggáva

Grannskoðan er undir tættari altjóða regulering, heruppií í ES. Politiskt er gjørt av, at Føroyar skulu fylgja hesum reglum. Føroyska lóggávan hevur tað donsku sum fyrimynd, við teimum frávikum, sum føroysk viðurskifti gera neyðug.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir føroyska lóggávu um grannskoðan pr. 31. desember 2024:

- Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 9. mars 2023 (Grannskoðaralógin).
- Løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. (PIE-fyriskipanin).
- Kunngerð nr. 138 frá 18. oktober 2021 um óheftni hjá góðkendum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum.
- Kunngerð nr. 128 frá 24. august 2021 um kravda eftirútbúgving fyri góðkendar grannskoðarar.
- Kunngerð nr. 123 frá 26. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a., sum broytt við kunngerð nr. 139 frá 18. oktober 2021.
- Kunngerð nr. 121 frá 23. august 2022 um próvtøku o.a. fyri góðkendar grannskoðarar.
- Kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
- Kunngerð nr. 120 frá 23. august 2022 um Grannskoðaranevndina.
- Kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 136 frá 23. september 2021.
- Kunngerð nr. 25 frá 6. apríl 2011 um skrá yvir góðkend grannskoðanarvirkir og yvir góðkendar grannskoðarar, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 21. mai 2012.
- Kunngerð nr. 92 frá 6. september 2010 um grannskoðaravirksemi.
- Kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.
- Kunngerð nr. 5 frá 14. januar 2009 um trygd og ábyrgdartrygging fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

Lóggávan um grannskoðan í Føroyum hevur sína fyrimynd í danskari lóggávu, tó við nøkrum tillagingum. Eitt nú er gjørt av, at varðveita skipanina við einum serligum Grannskoðaraeftirlitið, hóast Revisortilsynet varð avtikið í Danmark. Í Danmark verður viðgerðin av frágreiðingum um góðskueftirlit á góðkendum grannskoðanarvirkjum framd beinleiðis av Erhvervsstyrelsen.

## 3. Grannskoðan í Føroyum

Skráseting Føroya førir eina almenna skrá yvir góðkendar grannskoðarar og yvir góðkend grannskoðanarvirkir[2].

### 3.1. Grannskoðanarvirkir

31. desember 2024 eru fylgjandi grannskoðanarvirkir skrásett í almennu skránni hjá Skráseting Føroya:

| Grannskoðanarvirki | Skrásetingarnummar |
|---|---|
| P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki | 5821 |
| Sp/F SPEKT, løggildir grannskoðarar | 2732 |
| Sp/F NUMO, góðkent grannskoðanarvirki | 5698 |
| Sp/F Agnar á Dul, skrásett grannskoðanarvirki | 5806 |
| Sp/F Grannskoðarastovan | 3868 |
| Sp/F MENTA | 5029 |
| Sp/F Roknskaparfelagið, skrásettir grannskoðarar | 2212 |

Á niðanfyristandandi ritmynd sæst gongdin í talinum av góðkendum grannskoðanarvirkjum (tvs. bæði løggildum og skrásettum grannskoðanarvirkjum)




[2] § 1, í kunngerð um skrá yvir góðkend grannskoðanarvirkir og yvir góðkendar grannskoðarar, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 21. mai 2012.

## 3.2. Góðkendir grannskoðarar

Á niðanfyristandandi ritmynd sæst gongdin í talinum av góðkendum grannskoðarum, býtt á løggildir og skrásettir grannskoðarar. Tað hoyrir við til gongdina, at tað síðan 2016 ikki hevur verið møguligt at gerast skrásettur grannskoðari[3].




[3] Sí tó serligu skiftisreglurnar í løgtingsmáli nr. 107/2014.

# 4. Grannskoðaraeftirlitið

## 4.1. Lóggáva

Setan, skipan, starvs- og fundarskipan, fígging umframt virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum er løgskipað í fylgjandi løgtingslógum og kunngerðum:

- Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 9. mars 2023 (Grannskoðaralógin).
- Løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. (PIE-fyriskipanin).
- Kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
- Kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 136 frá 23. september 2021.
- Kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.

## 4.2. Skipan av Grannskoðaraeftirlitinum

Skráseting Føroya setir Grannskoðaraeftirlitið[4]. Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 4 limir. 2 av limunum skulu hava hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu. Hinir 2 limirnir umboða roknskaparbrúkaran.

Limirnir í Grannskoðaraeftirlitinum eru:

| | |
|---|---|
| Rannvá Sólheim | Forkvinna |
| Nina Djurhuus | Umboð fyri roknskaparbrúkaran |
| Malan Johansen | Umboð fyri roknskaparbrúkaran |
| Eyðfinn Olsen | Við hóskandi útbúgving og royndum innan grannskoðan og roknskapargreiðslu |
| Teitur Samuelsen | Við hóskandi útbúgving og royndum innan grannskoðan og roknskapargreiðslu |

Skráseting Føroya er avgreiðslustova hjá Grannskoðaraeftirlitinum[5]. Starvsfólk á Skráseting Føroya røkja skrivarauppgávuna hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

[4] Sbrt. § 32 í grannskoðaralógini (løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 9. Mars 2023.

[5] Sbrt. § 2 í Kunngerð um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 136 frá 23. september 2021

## 4.3. Fígging

Raksturin av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini verður fíggjaður umvegis eitt árligt gjald frá øllum góðkendum grannskoðarum, sum eru knýttir at einum grannskoðanarvirki pr. 1. januar í innkrevjingarárinum[6]. Skráseting Føroya innkrevur gjaldið.

Útreiðslur í samband við tey góðskueftirlit, ið verða framd, verða bornar av teimum grannskoðanarvirkjum, ið skulu til góðskueftirlit[7].

Nærri reglur viðvíkjandi uppgerð av kostnaði og samsýning eru ásettar í leiðreglunum fyri góðskueftirlit hjá Grannskoðaraeftirlitinum[8].

[6] Sí kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.
[7] Sí kapittul 11 í kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
[8] Sí leiðreglurnar á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya: www.skraseting.fo

## 5. Góðskueftirlit

### 5.1. Endamálið við góðskueftirliti

Tá ein grannskoðari gevur grannskoðaraátekningar á roknskapir, heruppií tá grannskoðarin ummælir leiðslufrágreiðingar sambært ársroknskaparlógini, og tá grannskoðarin gevur aðrar váttanir við trygd, ið ikki einans eru ætlaðar til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um tær, er grannskoðarin álitisumboðið hjá almenninginum[9]. Grannskoðarin skal tí gera uppgávurnar í samsvari við góðan grannskoðarasið, heruppií vísa tann neyvleika og skjótleika sum einstaka uppgávan loyvir. Grannskoðarin skal vísa professionelt ivasemi, integritet, partloysi, trúnað, yrkisliga framferð, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, tá uppgávurnar verða framdar.

Endamálið og virkisøkið hjá Grannskoðaraeftirlitinum er í høvuðsheitum at hava eftirlit við at góðkendu grannskoðanarvirkini virka í samsvar við grannskoðaralógina og teir standardir, ið eru ásettir har. Eftirlitið hjá Grannskoðaraeftirlitinum verður kalla eitt *góðskueftirlit*. Teir persónar, ið fara á grannskoðanarvirkini at fremja sjálvt eftirlitið verða kallað *góðskueftirlitsfólk*.

Grannskoðanarvirkir og teir grannskoðarar, ið har starvast, hava skyldu at geva seg undir góðskueftirlit[10].

### 5.2. Góðskueftirlitsfólkini

Grannskoðaraeftirlitið útnevnir góðskueftirlitsfólk, sum kunnu fremja góðskueftirlit fyri eitt 5 ára tíðarskeið[11].

Sambært grannskoðaralógini skal grannskoðaraeftirlitið útnevna teir grannskoðarar, sum kunnu fremja góðskueftirlit fyri eitt 5 ára tíðarskeið. Góðskueftirlitsfólkini skulu hava hóskandi yrkisútbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu og hava neyðugan kunnleika til góðskueftirlit. Higartil hevur Grannskoðaraeftirlitið útnevnt danskar løggildar grannskoðarar, sum Erhvervsstyrelsen hevur góðkent, til at gera góðskueftirlit á teimum smærru grannskoðanarvirkjunum í Føroyum.

Góðskueftirlit á størri grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga (PIE-fyritøkur) verður framt av starvsfólkum í Erhvervsstyrelsen. Politiskt er komið ásamt um, at Erhvervsstyrelsen í samstarvi við Grannskoðaraeftirlitið skal røkja hesa uppgávu viðvíkjandi teimum føroysku grannskoðanarvirkjunum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga í Føroyum.

### 5.3. Innihaldið av einum góðskueftirliti

Eitt góðskueftirlit fevnir um eina meting av góðskustýringsskipanini sambært §§ 26 og 26a. Eitt góðskueftirlit fevnir harumframt um eina meting um arbeiði og óheftni í sambandi við at

[9] Sbrt. § 15 í grannskoðaralógini.
[10] Sbrt. § 27 í grannskoðaralógini.
[11] Sbrt. § 33, stk. 1, í grannskoðaralógini.

grannskoðarnavirkið letur váttanir við trygd, til dømis grannskoðaraátekning á ársfrágreiðingar hjá fyritøkum, sum skulu grannskoðast samsvarandi ársroknskaparlógini[12].

Góðskueftirlitsfólkið skal serliga kanna[13]:

1) At grannskoðanarvirki hevur eina innanhýsis skipan og eina góðskustýringsskipan, sbrt. § 26 í grannskoðaralógini og at grannskoðanarvirkið hevur skjalprógvað nýtsluna av góðskustýringsskipanini.
2) At góðskustýringsskipanin er nøktandi í mun til støðd og rakstrarligu eyðkenni virkisins.
3) At góðskustýringsskipanin hevur politikkir og mannagongdir fyri, hvussu óheftni hjá grannskoðaranum verður stýrt sum heild og í sambandi við tað einstøku uppgávuna, umframt at tað verður prógvað at óheftnisreglurnar í kapitli 4 í grannskoðaralógini og reglur ásettar við heimild í hesum, eru yvirhildnar.
4) At váttanaruppgávur eru skipaðar, lagdar til rættis, framdar og skjalprógvaðar í samsvari við góðskustýringsskipana og góðan grannskoðanarsið, heruppií galdandi grannskoðanar-standardar, umframt ta nýttu arbeiðsorkuna og samsýningarnar í mun til váttanaruppgávuna.
5) At grannskoðanarvirkið hevur skipað eina eftirlitsmannagongd, ið fevnir um bæði eftirlit við góðskustýringsskipanini og eftirfylgjandi regluligt innanhýsis eftirlit við góðskuni av framdu váttanaruppgávunum.
6) At virkið hevur eitt dagført eigarayvirlit og limayvirlit, og at ásetingarnar um eigaraviðurskifti eru hildnar.
7) At grannskoðarar, knýttir at grannskoðanarvirkinum hava verið ígjøgnum og fráboðað ta kravdu eftirútbúgvingina.
8) At grannskoðanarvirkið hevur hildið sínar skyldur um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

Grannskoðaraeftirlitið kann taka avgerð um, at eitt ella fleiri av omanfyristandandi viðurskiftum ikki skulu kannast í sambandi við eina góðskueftirlitsvitjan[14].

### 5.4. Val av stakroyndum

Talið av grannskoðaraátekningum og øðrum váttanum við trygd, sum skulu takast út til stakroyndaeftirlit, fer fram lutfalsliga í mun til samlaða talið av grannskoðaraátekningum og øðrum váttanum við trygd, sum grannskoðaravirkið hevur latið í undanfarna ári. Ítøkiligar váttanaruppgávur, sum skulu takast út til stakroyndaeftirlit, verða valdar samsvarandi einari váðameting, har støða eisini skal takast til slag og vavið av teimum váttanaruppgávum, sum grannskoðaravirkið hevur latið. Sum meginregla verða einans váttanaruppgávur, ið eru latnar innan seinastu 12 mánaðirnar, tiknar út til stakroyndaeftirlit. Nærri reglur hesum viðvíkjandi eru ásettar í leiðreglunum fyri góðskueftirlit, sum eru tøkar á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.

[12] § 27, stk. 2 í grannskoðaralógini.
[13] § 26 í kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
[14] § 26, stk. 2, í kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.

### 5.5. Skyldurnar hjá grannskoðanarvirkinum

Tá ið góðskueftirlit fer fram á einum grannskoðanarvirki, skal virkið geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal syrgja fyri, at Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fáa tær upplýsingar og ta hjálp, ið verður mett neyðug til tess at fremja góðskueftirlitið.

Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, hava samsvarandi skyldu mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum. Grannskoðaraeftirlitið kann biðja góðskueftirlitsfólkið og grannskoðanarvirkið um tey skjøl og ta hjálp, sum Grannskoðaraeftirlitið metir vera neyðugt, til tess at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar.

### 5.6. Frágreiðing um góðskueftirlit

Tá ið góðskueftirlitið er endað, skal góðskueftirlitsfólkið gera eina frágreiðing, ið skal sendast til Grannskoðaraeftirlitið, og sum verður nýtt sum grundarlag undir avgerðini, sum Grannskoðaraeftirlitið tekur í sambandi við góðskueftirlitið.

Í frágreiðingini skal vera ein lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið av kanningini, ein meting av góðskustýringarskipanini, umframt fremjanini av váttanaruppgávum, og óheftni í sambandi við slíkar uppgávur. Góðskueftirlitsfólkið skal í frágreiðing síni vísa á teir skeivleikar, og á møgulig brot á lóggávuna, sum komið er fram á í sambandi við góðskueftirlitið. Eisini skal góðskueftirlitsfólkið, í tann mun hetta er viðkomandi, gera tilmæli til grannskoðanarvirkið um, hvussu viðurskiftini kunnu fáast í rættlag.

### 5.7. Avgerð hjá Grannskoðaraeftirlitinum

Tá ið eitt góðskueftirlit er komið at enda, skal Grannskoðaraeftirlitið viðgerða frágreiðingina við tí fyri eyga at staðfesta, um frágreiðingin gevur høvi til:

1) at enda eftirlitið uttan onnur tiltøk, ella
2) at taka avgerð um, at góðskueftirlit verður aftur, har tað skal staðfestast, um tilmæli í sambandi við undanfarna eftirlit eru komin í rættlag.

Í tann mun góðskueftirlitsfrágreiðingin vísir, at viðurskifti eru, sum eiga at vera fingin í rættlag, verður grannskoðanarvirkið vanliga biðið um at gera eina virkisætlan, ið verður grundarlag undir næsta góðskueftirlitinum. Virkisætlanin skal, sambært leiðreglunum hjá Grannskoðaraeftirlitinum, í minsta lagi innihalda eitt yvirlit yvir átøk, ið eru sett í verk, ella sum skulu setast í verk til tess at bøta um viðurskiftini, viðkomandi ábyrgdarpersónar og eina tíðarætlan. Grannskoðaraeftirlitið skal góðkenna virkisætlanina.

Avgerðir hjá Grannskoðaraeftirlitinum eru endaligar innan fyrisitingina.

## 5.8. Grannskoðaranevndin

Um góðskueftirlitsfrágreiðingin ella viðurskiftini annars geva orsøk til tess, kann Grannskoðaraeftirlitið gera av, at leggja mál hjá einum grannskoðanarvirki fyri Grannskoðaranevndina.

Grannskoðaranevndin er serliga dissiplinerskipanin fyri góðkend grannskoðanarvirkir og góðkendar grannskoðarar. Grannskoðaranevndin kann eitt nú áleggja viðkomandi virki ella grannskoðara bøtur, og/ella taka avgerð um at frádøma góðkenningina sum grannskoðari.

Avgerðir hjá Grannskoðaranevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

## 5.9. Títtleikin av góðskueftirliti

Grannskoðanarvirkir skulu ikki til góðskueftirlit á hvørjum ári. Tó skulu góðskueftirlit sambært grannskoðaralógini[15] fara fram við í mesta lagi hesum millumbilum:

| Grannskoðanarvirkir, ið grannskoða | Skulu til góðskueftirlit |
|---|---|
| Stórar fyritøkur av almennum áhuga (PIE) | Í minsta lagi 3. hvørt ár |
| Smáar og miðalstórar fyritøkur av almennum áhuga (PIE) | Í minsta lagi 6. hvør ár |
| Miðalstórar og stórar fyritøkur, ið ikki eru fevndar av hugtakinum “almennum áhuga” | Í minsta lagi 6. hvør ár |
| Smærri fyritøkur, ið ikki eru fevndar av hugtakinum “almennum áhuga” | Millumbilið verður ásett samsvarandi einari váðameting |

Á ritmyndini niðanfyri sæst talið av góðskueftirlitum í tíðarskeiðnum 2011-2024. Eftirlitini í 2011-2012 vóru skipaði sum tænastueftirlit[16], og eftirlitini í 2013 vóru uppfylgjandi tænastueftirlit.

[15] Sbrt. § 27, stk. 3 í grannskoðaralógini.

[16] At talan er um tænastueftirlit merkir, at Grannskoðaraeftirlitið frammanundan eftirlitið hevði tikið avgerð um, at einki mál skuldi leggjast fyri Grannskoðaranevndina, uttan í teimum førum, har kannaða grannskoðanarvirkið onga góðskustýringsskipan hevði, og ikki hevði í umbúna at fáa sær slíka. Einki mál var lagt fyri Grannskoðaranevndina í hesum tíðarskeiðið.




### 5.10. Leiðreglur

Grannskoðaraeftirlitið ger nærri leiðreglur fyri góðskueftirlit, sum áseta nærri, hvat góðskueftirlitið á grannskoðanarvirkjum skal fevna um, heruppií tá ið talan er um góðskueftirlit á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga[17].

Grannskoðaraeftirlitið gjørdi fyrstu ferð leiðreglur í 2011, og tóku tær støði í leiðreglunum hjá Erhvervsstyrelsen frá 2008. Leiðreglurnar eru síðan dagførdar árliga samsvarandi teimum broytingum, ið eru gjørdar í donsku leiðreglunum, við neyðugum tillagingum í mun til føroysk viðurskifti og lóggávu.

Leiðreglurnar hjá Grannskoðaraeftirlitinum fyri 2024 taka støði í donsku leiðreglunum fyri 2023, við neyðugum tillagingum, serliga vegna munir í føroyskari og danskari lóggávu. Broytingarnar í leiðreglunum fevna í høvuðsheitum um tillagingar í brotunum 2.2.2-2.5.1, ið viðvíkja tann partin av góðskueftirlitinum, ið snýr seg um gjøgnumgongd av innanhýsis skipanini hjá grannskoðanarvirkinum, heruppií góðskustýringsskipanini, umframt val av stakroyndum. Sí brotini 2.2.2-2.5.1. Fleiri broytingar kunnu væntast í 2025.

Leiðreglurnar og tey skjøl, sum góðskueftirlitsfólkini skulu nýta í samband við góðskueftirlit, liggja frammi á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.[18]

---

[17] Sbrt. § 45 í kunngerð um góðskueftirlit og virksemi grannskoðaraeftirlitsins.
[18] https://www.skraseting.fo/fo/grannskodarar/grannskodaraeftirlitid

## 6. Góðskueftirlit 2024

Á skránni hjá Grannskoðaraeftirlitinum í eftirlitsárinum 2024 var:

- Fýra vanlig góðskueftirlit
- Eitt uppfylgjandi góðskueftirlit
- Viðgerð av eini virkisætlan

### 6.1. Vanligu góðskueftirlitini

Grannskoðaraeftirlitið framdi trý vanlig góðskueftirlit í 2023. Av tí at hesi vóru liðugt viðgjørd í 2024, vera høvuðstættirnir frá hesum eftirlitum í stuttum lýstir niðanfyri.

Grannskoðaraeftirlitið framdi í 2024 tvey vanlig góðskueftirlit. Eitt teirra var liðugt viðgjørt í 2024, og verður tískil tikið við í hesi frágreiðing. Seinna eftirlitið verður væntandi umrøtt í ársfrágreiðingini fyri eftirlitsárið 2025.

Niðurstøðan av framdu góðskueftirlitunum í 2023 vóru, at tvey eftirlit vóru endað uttan onnur tiltøk, sbrt. § 31, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini.[19] Í sambandi við triðja eftirlitið varð avgjørt, at neyðugt var við uppfylgjandi eftirlitið, sbrt § 31, stk. 1, nr. 2.

#### 6.1.1. Eygleiðingar og tilmæli

Niðanfyri í brotunum 6.1.1.1., 6.1.1.2., 6.1.1.3. og 6.1.1.4., síggjast nøkur av teimum tilmælum og eygleiðingum, ið góðskueftirlitsfólkini hava víst á.

##### 6.1.1.1. Tíðarætlan og skjalfesting

- Mælt verður til, at Grannskoðanarvirkið nýtir góðskustýringskipanina til at skjalføra øll grannskoðanarskjøl og harumframt, at skjalføringin skal vera framd seinast 60 dagar eftir undirskrift.
- Áðrenn undirskriva verður, skal grannskoðarin tryggja sær, at øll grannskoðanarskjøl eru fingin til vega og at alt grannskoðanararbeiði er framt.
- Innanhýsis eftirlitið skal eisini fevna um eina gjøgnumgongd av góðskustýringsskipanini, óansæð um grannskoðanarvirki nýtir eina standardskipan.
- Grannskoðarin skal, tá hesin ger váttanaruppgávur, tryggja at tað verður innheinta nøktandi skjalprógv til at stuðla tí givnu váttanini umframt at tryggja nøktandi skjalprógv fyri framdar gerðir, serliga í mun til virðismeting av týdningarmiklum og váðafullum roknskaparpostum. Omanfyristandandi fevnir eisini um grannskoðanina av sølu og langtíðar skuld. Grannskoðanin av eftirfylgjandi hendingum skal somuleiðis styrkjast.
- Grannskoðarin skal tryggja, at øll mál eru avgreidd og skjalprógva, innan váttan verður givin.
- Um so er at tað eru frávik, skal tað tryggjast at arbeiðspappírini hjá grannskoðaranum innihalda eina grundaða støðutakan til, hvørja ávirkan hetta skal hava fyri givnu váttanina.

[19] Kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins

#### 6.1.1.2. Týdningarstøði og váðameting

- Mælt verður til at grannskoðarin einans nýtir eitt *benchmark* til at áseta týdningarstøði
- Við planlegging av grannskoðan (eisini víðkað gjøgnumgongd) skal grannskoðanarvirki fokusera uppá at gera eina váðameting av týdningarmiklum og váðafyltum økjum, tvs. har vandin fyri feilum er størstur (t.d. goodwill og útskotnar skattaognir).
- Grannskoðarin skal í hvørjari váttanaruppgávu/roknskaparposti syrgja fyri at velja rætta váðastøði í góðskustýringarskipanini (lágt, millum ella høgt) av tí at hetta er av avgerðandi týdningi fyri at grannskoðarin fremur røttu og nøktandi grannskoðanarstigini/UG-stigini. Grannskoðarin skal vera varugur við, at økið "nettosøla" sum útgangsstøði hevur høgan/týðandi váða, um hetta útgangsstøði ikki kann avsannast.
- Grannskoðarin skal í øllum grannskoðanarmálum halda ISA 230 "*revisionsdokumentation*", har tað millum annað í brot 8 framgongur, at *"revisor skal udarbejde revisionsdokumentation, som er tilstrækkelig til, at en erfaren revisor, som ikke har forudgående tilknytning til revisionen, er i stand til at forstå følgende..."*.
- Grannskoðarin skal tryggja, at tað í øllum málum verður tikin støða til møguligar týðandi hendingar eftir fíggjarjavnadagin. Skjalprógv skal vera fyri hesum, t.d. við avriti av roknskaparjavna fyri tað fylgjandi roknskaparári.
- Umframt at planlegging av váttanaruppgávum skal verða nøtkandi, skal tryggjast, at planleggingin inniheldur identifikation av týðandi og váðafyltum postum og roknskapir, ið innihalda týdningarmiklar roknskaparligar metingar. Planleggingin skal eisini taka hædd fyri stigum til tess at avdúka slík týðandi og váðafylt økir. Mannagongdir til fremjan av óheftnismetingum skulu fylgjast fult út í hvørjari váttanaruppgávu.

  Serligt fokus skal vera á roknskaparpostar sum søla, langtíðarskuld og roknskaparpostar ið er tengdir at einari roknskaparligari metan.

#### 6.1.1.3. Góðskustýringarskipan

- Tað verður viðmælt, at góðskustýringarskipanin verður víðkað soleiðis, at hetta eisini kann fevna um, og klára at stýra grannskoðan av samtaksroknskapum, bæði við og uttan aðrar "komponentrevisorar" og í samsvari við ISA 600.

#### 6.1.1.4. Onnur tilmæli og eygleiðingar

- Grannskoðarin skal tryggja at grannskoðanin av samtaksroknskapum fer fram í fullum samsvari við ISA 600 og onnur viðkomandi krøv.
- Í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd, skal grannskoðarin tryggja at allar "supplerende handlinger ved udvidet gennemgang" verða framdar. Um ein av hesum "handlingum" ikki er viðkomandi skal hetta noterast og grundgevast.
- Tryggjast skal, at grundarlagið fyri framhaldandi rakstri av fyritøkuni (going concern) verður grannskoðaður í nøktandi mun.
- Grannskoðarin skal tryggja at leiðslan í kundafyritøkuni góðkennir og undirritar viðkomandi skjøl innan tær ásettu freistirnar.

### 6.2. Virkisætlan

Grannskoðaraeftirlitið góðkendi virkisætlanina, ið var gjørd sum fylgja av einum vanligum góðskueftirlitið, ið var framt á einum grannskoðanarvirkið á heystið 2024. Grannskoðaraeftirlitið metti, at grannskoðanarvirkið hevði eina ætlan fyri tiltøk, ið skuldu setast í verk til tess at bøta um tær viðmerkingar, ið góðskueftirlitsfólkið hevði frá eftirlitinum. Grannskoðaraeftirlitið metti eisini, at tíðarætlanin var rímilig.

### 6.3. Uppfylgjandi góðskueftirlit

Uppfylgjandi góðskueftirlitið var framt í framhaldi, av einum vanligum góðskueftirlitið í 2022. Grannskoðaraeftirlitið gjørdi tá av, at neyðugt var við einum uppfylgjandi góðskueftirliti, har tað skuldi staðfestast um væntandi viðurskiftini og tilmælini hjá góðskueftirlitsfólkinum eru fingin í rætt lag. Grannskoðanarvirkið var biðið um at gera ein virkisætlan, ið skuldi vera grundarlagið undir uppfylgjandi eftirliti.

Uppfylgjandi eftirlitið staðfesti, at 8 út av 9 tilmælum vóru sett í verk. Tilmælið, ið eftir var, fevndi um grannskoðan av samtøkum. Av tí, at grannskoðanarvirkið til uppfylgjandi eftirlitið ikki hevði nakran samtakskunda, var hetta tilmælið ikki longur viðkomandi.

Góðskueftirlitsfólkið hevði harumframt tvey tilmæli. Grannskoðaraeftirlitið gjørdi av, at góðskueftirlitið verður endað, treytað av, at grannskoðanarvirkið tekur tey tvey tilmælini frá góðskueftirlitsfólkinum til eftirtektar.

### 6.4. Grannskoðaranevndin

Grannskoðanareftirlitið metti, at góðskueftirlitsfrágreiðingarnar í eftirlitsárinum 2024 ikki góvu Grannskoðaraeftirlitinum orsøk til at leggja nakað mál fyri Grannskoðanarnevndina.

Tórshavn 22. apríl 2025

Vegna Grannskoðaraeftirlitið

Rannvá Sólheim
Forkvinna